## Læknar úr Pólandi

Læknatrotið í Danmark hevur noytt danska hervaldið at velja eina heldur óvanliga loysn. Hervaldið hevur 56 hjálparlæknastørv, men í longri tíð hevur bara annaðhvørt starv verið sett. Tí hevur herleiðslan nú leitað sær hjálp úr Pólandi, og fyribils eru níggju polskir læknar settir í starv hjá herinum. Vísir tað seg, at hetta roynist væl, ætlar herurin at fáa fatur á 10 polskum læknum afturat, tí danskir læknar eru ikki at finna.

## Bókmentavitjan úr Sveis

Í næstu viku koma trý fólk á vitjan úr Sveis. Tvey av teimum eru ritstjórarnir á bókini Von Inseln weiss ich... (Eg oyggjar veit) við føroyskum stuttsøgum týddar til týskt. Triðja fólkið er rithøvundur, sv-ritstjóri og hevur verið professari í retoromanskum bókmentum. Tiltøkini verða trý eitt á setrinum, eitt í Loungini á Hotel Hafnia og eitt í Norðurlandahúsinum. Mikudagin verður fyrilestur um sveisiskar bókmentir við sveisiskum høvundanum og bókmentafrøðinginum Carmartin.

Mikukvøldið verður bókmentakvøld í Loungini á Hotel Hafnia, har evnini serliga eru málpolitikkur og bókemntir.

Seinasti fyrislesturin verður hóskvøldið í Norðurlandahúsinum, har bókin, Von Insels Weiss Ich – eg oyggjar veit – verður løgd fram.

# Jógvan bleiv bombarderaður

**Landsstýrismaðurin í Norðurlendskum samstarvi, Jógvan á Lakjuni slapp veruliga at royna seg undir spyrjitímanum í morgun. Úr høgru og vinstru bleiv hann spurdur um støðuna hjá samkyndum í Føroyum.**

NORÐURLANDARÁÐSFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

**Christiansborg:** - Hetta er heilt ótrúligt. Ein føroyskur ráðharri verður vanliga ongantíð spurdur um nakað sum helst, men í dag verður eg spurdur úr høgru og vinstru. Eg havi svarað tykkara spurningum fleiri ferðir, og tími ikki at endurtaka svarið enn einaferð.

Tað var eingin ivi um, hvør fekk flestar spurningarnar í spyrjitímanum fyrrapartin, tá orðaskiftið í Norðurlandaráðnum var á skránni. Sum føroyskur ráðharri í Norðurlandamálum bleiv Jógvan á Lakjuni álopin við hvøssum atfinningum um støðuna hjá samkyndum í Føroyum.

- Tað er eingin ivi um, hvør hevur verið toppskorari við spurningum higartil, men nú haldi eg eisini, at tit eiga at seta spurningar til aðrar ráðharrar enn tann føroyska, tí annars gerast teir arbeiðsleysir, helt formanskapurin skemtiliga fyri undir spyrjitímanum.

### Mannarættindi

- At verða álopin og happaður fyri at vera samkyndur er eitt greitt brot á grundleggjandi mannarættindi. Hetta er ikki bara eitt mál fyri Føroyar. Hetta er hinvegin eitt mál fyri alt heimssamfelagið at verja mannarættindi. Og mannarættindi eru væl eisini galdandi í Føroyum, spurdi Rannveig Gudmundsdóttir speiskliga føroyska ráðharran.

Íslendski tinglimurin vísti á, at Norðurlandaráðið fyri 25 árum síðan fann hvassliga at Íslandi, tí íslendingar ikki virdu samkynd. Rannveig Gudmundsdóttir nevndi tilburðin við Rasmus Rasmussen, og helt fyri, at Føroyar áttu at fáa



*Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður*

somu viðferð frá Norðurlandaráðnum sum Ísland fekk fyri 25 árum síðan, tí tilburðurin við Rasmusi Rasmussen í oktober mánaði var eitt klokkuklárt dømi um, at føroyingar ikki virða tey samkyndu- og harvið ikki mannarættindi.

Rannveig Gudmundsdóttir er partur av sosialdemokratiska bólkinum í Norðurlandaráðnum, og hon heitti staðiliga á aðrar politiskar bólkar undir Norðurlandaráðnum um at fordøma støðuna hjá samkyndum í Føroyum, og bað samstundis føroyskar politikarar geva samkyndum somu rættindi, sum onnur Norðanlond hava.

Tað var kortini ikki bara íslendski politikarin, sum reisti spurningin. Bæði svenskir og danskir politikarar spurdu upp til fleiri ferðir, hví samkynd ikki vera vard, um samkynd eru vælkomin í Føroyum og nær Føroyar ætla at veita samkyndum verju móti happing og mismuni.

Donsku fólkatingslimirnir Mogens Jensen (S) og Line Barfoed (E) knýttu spurningin um sjálvstøðugan føroyskan limaskap og støðuna hjá samkyndum saman.

- Hví skulu vit geva føroyingum somu rættindi í Norðurlandaráðnum sum vit hava, tá teir ikki kunnu veita sínu egnu borgarum somu rættindi í Føroyum, spurdi Mogens Jensen

### Sjokeraður

Jógvan á Lakjuni varð ikki sørt ørkymlaður og stundum illur inn á mongu spurningar, sum vóru settir honum í morgun. Hann segði seg vera sjokeraðan av myndini, sum Norðanlond vilja geva av Føroyum. Hann vísti á, at Føroyar eru eitt gott land at búgva í, tí sambært hagtølunum eru Føroyar besta norðanlandið at búgva í, tí vit hava millum annað lágt arbeiðsloysi, lítlan og ongan kriminalitet og eitt høgt barnatal.

- Danskir miðlar hava seinastu vikurnar miðvíst roynt at seta Føroyar í ringt ljós, tí tað dámar teimum best. Útleggingin av støðuni hjá samkyndum hjá teimum er fullkomiliga burturvið, tí vit diskriminera ongan í Føroyum. Eg taki fullkomiliga frástøðu frá tilburðinum í farna mánað, men eg vil staðiliga vísa á, at hatta er ikki nakað sum hendir regluliga í Føroyum. Tí haldi eg, at tað er ótrúligt, at Norðanlond skulu ganga á odda við at seta Føroyar í ringt ljós, segði ein kensluborin Jógvan á Lakjuni.

Hann legði serliga eftir Rannveig Gudmundsdóttir. sum hann metti hava fornermað føroysku tjóðina við sínum álopum.

- Tað er undrunarvert, at harðastu atfinningarnar skulu koma úr Íslandi, tá hugsað verður um at Føroyar og Ísland eru nærmastu grannar og bróðratjóðir, segði landsstýrismaðurin.

### Demokratiskur rættur

- Tað er rættiliga deildar meiningar um spurningin. Bíblian verður tulkað ymiskt, og tað tekur tíð at flyta mørk. Eg eri ikki vísur í, at tað fer at eydnast at broyta lógina hesaferð, men møguliga eydnast tað næstu ferð, ta málið kemur fyri løgtingið.

Soleiðis orðaði løgmaður seg, tá hann í gjár bleiv spurdur um støðuna hjá samkyndum undir setanarorðaskiftinum. Eins og Jóannes Eidesgaard vísti á í gjár, segði Jógvan á Lakjuni, at Norðanlond verða noydd at virða støðuna hjá føroyska fólkinum og politikarunum.

-Eg skal viðmerkja, at meirluti av føroyska fólkinum ikki ynskir at broyta revsilógina, og tað er ein demokratiskur rættur hjá okkum at hava tað støðuna, vit hava í málinum.

Føroyar og Grønland er einastu Norðanlond, sum framvegis ikki hava víðka revsilógina til eisini at umfata kynsliga orientering.

# Limaskapurin dregur út

**Tað verður í fyrsta lagi á Norðurlandaráðsfundinum í Oslo komandi ár, at ein avgerð verður tikin í spurninginum um sjálvstøðugan føroyskan limaskap í Norðurlandaráðnum. Hetta gjørdist greitt undir orðaskiftinum í Keypmannahavn í morgun.**

NORÐURLANDARÁÐSFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

**Christiansborg:** Tað eydnaðist heldur ikki á Norðurlandaráðsfundinum í ár at koma til eina niðurstøðu í málinum um føroyskan sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum. Málið hevur verið á skránni síðan 2003, tá Føroyar søktu um sjálvstøðugan limaskap, men framvegis er eingin niðurstøða gjørd.

Drúgva viðgerðin av málinum fekk fleiri norðurlendskar tinglimir at tala at undir orðaskiftinum í morgun, og heittu á avvarðandi myndugleikar um skunda undir málið.

- Persónliga hevði eg vónað, at vit kundu koma til eina niðurstøðu í málinum á hesum Norðurlandaráðsfundinum. Tað er at halda Føroyar fyri gjøldur, at vit ár eftir ár mugu útseta avgerðina, og tí mæli eg til, at vit sum skjótast koma til eina niðurstøðu, segði Rannveig Gudmundsdóttir, sum er partur av Sosialdemokratiska bólkinum.

### Møgulig broyting

Formaðurin í Norðurlandaráðnum, Ole Stavad, vísti á, at tað framvegis er ov tíðliga at taka eina endaliga støðu í málinum um sjálvstøðugan limaskap, tí viðgerðin er einfalt ikki liðug enn. Hann legði afturat, at vónandi kann ein avgerð takast á komandi Norðurlandaráðsfundinum í Oslo komandi ár. Formaðurin í Norðurlandaráðnum segði, at hann persónliga ynskti, at tey sjálvstøðugu økini, Føroyar, Áland og Grønland fáa ein virknari leiklut í norðurlendska samstarvinum.

Higartil hevur verið broytingin av Helsingforsavtaluni verið stóri snávingarsteinurin, tá sjálvstøðugur føroyskur limaskapur hevur verið umrøddur. Helsingforsavtalan loyvir bert sjálvstøðugum statum at fáa fullan limaskap í Norðurlandaráðnum.

- Tað er eftir mínum tykki eingin trupulleiki hjá Føroyum at gerast partur av sjálvum Norðurlandaráðnum, men hinvegin eru møguliga løgfrøðiligar forðingar fyri, at Føroyar kunnu gerast partur av ráðharraráðnum. Kortini havi eg eina vón um, at Helsingforsavtalan kann broyast, so Føroyar eisini kunnu gerast partur av ráðharraráðnum, segði Ole Stavad í morgun.

Jógvan við Keldu spurdi um nøkur ítøkilig ætlan er um at broyta Helsingforsavtaluna, og heitti samstundis á Norðurlandaráðið um at fara undir at fyrireika eina ítøkiliga broyting av Helsingforsavtaluni, so Føroyar kunnu gerast limur sum skjótast.

### Politiskur vilji

Føroyskir politikarar vóru ikki óvæntað allir á talarastólinum og strongdu á eina avgerð í málinum. Høgni Hoydal, Jógvan við Keldu, Kári P. Højgaard og Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, fíltust allir á, at ov stórur dentur verður lagdur á løgfrøðiligu forðingar, tí eftir teirra tykki kann málið lætt loysast, um politiskur vilji er fyri føroyskum limaskapi millum limalondini.

- Norðanlond hava altíð sýnt stóran solidaritet úteftir, tá aðrar tjóðir hava roynt at gerast limur av ymiskum altjóða felagsskapum. Eg vóni tískil, at Norðanlond eisini fara at sýna sín solidaritet inneftir, nú Føroyar ynskja at gerast limur, segði Jóannes Eidesgaard undir umrøðuni.